gult cyan magenta svart



# Gjestal Vestlandsgarn SuperwashSport

## Barnajakkar

| Størrelser | | 2 | 4 | 6 | 8 | 10 år |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** | | | | | | |
| (plaggets mål) | Ca. | 70 | 76 | 82 | 88 | 94 cm |
| **Hel lengde:** | Ca. | 36 | 40 | 44 | 48 | 52 cm |
| **Ermelengde:** | Ca. | 26 | 30 | 33 | 36 | 39 cm |

**MATERIALER: Gjestal Vestlandsgarn (100% ull) eller Superwash Sport (100% superwash ull), nøster à 50 g.**
**Kan også strikkes i Gjestal Bomull Sport (100% bomull).**

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| mørke grønt nr. 212 eller marineblått nr. 206 | | | | | | |
| = bunnfargen | ca. | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 nøster |
| rødt nr. 240 eller mørke grønt nr. 212 | | | | | | |
| = farge 1 | ca. | 1 | 2 | 2 | 3 | 3 nøster |
| Tillegg til jakke med motiv. | | | | | | |
| marineblått nr. 206 eller mørke grønt nr. 212 | | | | | | |
| = farge 2 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 nøste |
| oransje nr. 239 | | | | | | |
| = farge 3 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 nøste |
| hvitt nr. 217 | | | | | | |
| = farge 4 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 nøste |
| okergult nr.218 | | | | | | |
| = farge 5 | ca. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 nøste |

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3½ eller 4. Liten rundp nr. 3 til halsen. 6-7 knapper.

**Vanlige forkortelser**
M=maske, r=rett, vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske, arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 23 m glattstrikk i bredden på p nr. 3½ eller 4 måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**Jakke med motiv.**
**Ryggen**
Legg opp 72-76-84-92-96 m med mønsterfarge 1 på p nr. 2½ og str 7 p frem og tilbake i glattstr, 1 p vr til brettekant og 7 p glattstr. Skift til p nr. 3½ eller 4 og bunnfargen og str 1p glattstr fra vrangen hvor det økes jevnt fordelt til 82-86-94-102-106 m + 1 kantm i hver side som str r alle p. Str dobbel perlestr etter diagram I til arb måler fra brettekanten 36-40-44-48-52 cm og fell av m til en pen jevn kant som ikke strammer.

**Venstre forstykke**
Legg opp 32-36-40-42-46 m med mønsterfarge 1på p nr. 2½ og str kant som til ryggen. Skift til p nr. 3½ eller 4 og bunnfargen. Str 1p glattstr hvor det økes jevnt fordelt til 38-42-46-50-52 m + 1 kantm i hver side. Str dobbel perlestr etter diagram I til arb måler ca. 10-10-12-12-14 cm. Str inn en tråd i en annen farge over 18-18-22-22-26 m, 4 m fra siden til lommemarkering. Str videre mønster etter diagram I til arb måler fra brettekanten ca. 16-20-24-28-32 cm. Str videre etter diagram II (motivet kan broderes på til slutt). Str til arb måler 32-36-40-44-48 cm og fell de ytterste 5-6-7-8-9 m til halsringning. Fell videre på hver 2. p 3,2,2,1,1 m mot halsen (likt for alle størrelser) Str til arb måler som ryggen og fell de resterende m rett av.

**Høyre forstykke**
Str som venstre, men speilvendt.

**Ermer**
Legg opp 36-38-40-44-46 m med farge 1 på p nr. 2½ og str kant som til bolen. Skift til p nr. 3½ eller 4og øk ut til 53-55-57-59-61 m jevnt fordelt + 1 kantm i hver side. Str dobbel perlestr etter diagram I.Tell ut fra midten slik at mønsteret blir likt til hver side fra midten. Øk 1 m i hver side innenfor 1 kantm hver 5. p til det er ca. 79-83-87-91-95 m på p. Str til ermet måler 26-30-33-36-39 cm og fell av m til en pen jevn kant. Str det andre ermet likt.

**Uppskriftin hesa vikuna**



Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46

**Montering**
Mask eller sy sm m på skuldrene. Sy i ermene. Sy side og - ermesømmene i ett, med kantm til sømmemonn.
**Venstre stolpe pike, høyre gutt.**
Plukk eller str opp med farge 1 på p nr. 2½ ca. 76-86-96-106-116 m og str kant som nede på ryggen. Fell m løst av til en pen jevn kant som ikke strammer.
**Høyre stolpe pike, venstre gutt.**
Str som venstre men med 6-6-6-7-7 knapphull jevnt fordelt på 2. p. Knapphull lages ved å felle av 2 m som legges opp på ny neste p. Det nederste rett etter kanten nede og det øverste skal være i halskanten. Husk knapphull etter brettekanten òg. Brett alle kanter dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting.
**Halskant:** Plukk eller str opp ca. 76-78-82-86-90 m rundt halsen (over stolpene òg) med farge 1 på p nr. 2½ og str kant som nede på ryggen. Lag 1 knapphull på 2. p i flukt med knapphullene på stolpen. Husk knapphull etter brettekanten òg. Brett kanten dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting.
**Lommer:** Ta markeringstrådens øverste m på p nr. 3½ eller 4 og str mønster etter diagram I med bunnfargen til lommeposen måler 10-10-12-12-14 cm. Fell av m til en pen jevn kant. Ta markeringstrådens underste m inn på p nr. 2½ og str kant som nede på bolen. Fell av m til en pen jevn kant som ikke strammer. Str den andre lommen lik. Sy til innerlommene pent på vrangen, brett kanten dobbelt mot vrangen og sy til med løse sting. Fest lommekantene pent i sidene.
Broder eventuelt motivet på forstykkene med maskesting. Fest alle tråder pent på vrangen og sy i knapper

**Jakke uten motiv.**
Str som til jakke med motiv, men på forstykkene str mønster etter diagram I hele tiden.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*







ítróttur

Nr. 46 • mikudagur • 7. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# VB nýggjan formann

**Óli Holm verður varð mánakvøldið valdur til nýggjan formann í VB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá VB fyri stuttum hevði aðalfund, boðaði formaðurin, Mannbjørn Tausen, frá, at hann ikki ynskti at halda fram sum formaður. Í fyrstu atløgu varð eingin nýggjur formaður settur at taka við, men á nýggjum fundi mánakvøldið, varð Óli Holm valdur inn sum nýggjur formaður.

### Eingin kollvelting

Óli hevur í mong ár verið knýttur at VB á ymsan hátt, og millum annað hevur hann eisini áður verið formaður, men seinnu árini hava tað verið nevndarsessirnir í FSF, sum hava havt gleði av arbeiði hansara.

Við Sosialin sigur nýkosni formaðurin, at nú hann er vorðin formaður hjá VB, noyðist hann í øllum førum at siga sessirnar í teimum nevndum, sum hava við heimligu kappingina at gera, frá sær. Hesir eru sessirnir í kappingarnevndini og dómaranevndini, har Óli eisini er formaður.

Spurdur, um vágbingar kunnu vænta sær nakrar broytingar, nú nýggjur formaður er í felagnum, sigur Óli, at tað fær hann so einki sagt um í løtuni.

- Fyrst og fremst má eg seta meg inn í tingini. Síggja akkurát, hvussu felagið virkar, hvørjar avtalur vit hava koyrandi o.s.fr. Lat meg tó leggja afturat, at mín fatan í øllum førum er, at VB er eitt felag, sum í løtuni koyrir sera væl. Ja, somikið væl, at vit í fjør vunnu FM-heitið, so eg trúgvi neyvan, at fólkið í felagnum fer at merkja nakrar kollveltandi broyt-ingar.

Annars vísir Óli eisini á, at hann vónar, at alt tað sjálvbodna arbeiðið, sum fer fram í felagnum, eisini fer at standa við framyvir.

– Uttan alla tað sjálvbodnu arbeiðsmegi, sum VB verður borið av, hevði tað snøgt sagt verið ógjørligt at rikið felagið, sigur nýggi formaðurin at enda.



*Óli Holm varð mánakvøldið valdur til formann hjá VB*

# Dystir í kvøld

**Fýra hondbóltsdystir eru á skránni í kvøld**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan er um tríggjar mansdystir og ein kvinnudyst, sum skulu avgreiðast í kvøld, mikukvøldið, og er einsamalli kvinnudysturin í Vestmanna, har oddaliðið tekur ímóti Tjaldri. Einki er at ivast í, at enn ein sigur bíðar eftir VÍF kvinnunum her, og gongst sum væntað, eru tær bert fimm stig frá eini endaligari staðfesting av FM-heitinum.

### Tríggir mansdystir

Hjá monnunum verður somuleiðis dystur millum VÍF og Tjaldur, og eisini har eru fortreytirnar á leið tær somu.

Umframt Tjaldur, sum liggur í botninum, skulu eisini KÍF og H71 royna seg, og hjá báðum er talan um dystir móti liðum, sum er nakað væl ovari støðd á stigatalvuni. KÍF skal til Skála at spæla móti StÍF, meðan H71 skal spæla móti Kyndli, sum eigur heimavøll hendan dystin.

### Dystirnir eru hesir

*Kvinnur*
18.15 VÍF-Tjaldur
*Menn*
19.45 VÍF-Tjaldur
19.45 StÍF-KÍF
19.45 Kyndil-H71

# Ægir gjørt stuðulsavtalu



*Formaðurin í Ægi og stjórin í Norðoya Sparikassa skriva undir stuðulsavtaluna, sum verður galdandi næstu trýárini.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

**Svimjifelagið í Klaksvík skal næstu árini hava Norðoya Sparikassa sum høvuðsstuðul**

SVIMJING
*Eyðun Klakstein*

Fríggjadagin í farnu viku skrivaði svimjifelagið Ægir undir nýggja stuðulsavtalu við Norðoya Sparikassa.

Talan er um eina trý ár avtalu, sum fer at tryggjaði svimjifelagnum í Klaksvík eitt árligt gjalda frá sparikassanum.

John Mikkelsen, formaður í Ægi, og Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa skrivaðu undir avtaluna í svimjihøllini í Klaksvík fríggjadagin, tá nógvir av svimjarunum hjá Ægi eisini vóru til staðar.

– Vit eru væl nøgd við hesa avtaluna, sum gevur eitt gott ískoyti til raksturin av felagnum, sigur John Mikkelsen.

Eyðfinn Reyðberg sigur, at Norðoya Sparikassa vanliga hevur gjørt stuðulsavtalur av hesum slagi við størri ítróttarfeløgini, men at teir nú tilvitað eisini hugsa um tey smærru feløgini.

# Føroyingarnir nr. 5

**Tað gekk ikki sum ætlað hjá Frederiksberg Volley um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR

Í tí týdningarmikla dystinum móti Gentofte tapti Frederiksberg, við teimum trimum Alvildu Ólavsdóttir, Hjørdis Mortensen og Annika Joensen á liðnum, 3-1 í einum dysti, har serliga móttøkurnar og verjan hjá Frederiksberg ikki virkaði.

Um Frederiksberg skuldi varðveita vónina um eitt pláss í semifinaluni um danska meistaraheitið, skuldu tær helst vinna á Gentofte, men so var ikki.

Og tá HIK Aalborg heldur óvæntað vann 3-2 á Holte, sær tað nú rættuliga vónleyst út hjá Frederiksberg, at náa málið um eitt pláss í semifinaluni. Frederiksberg hevur tó enn ein lítlan møguleika, tí tær skulu leika seinasta dystin í hesum umfarinum komandi leygardag móti DHG Odense.

DHG hevur tó enn ongan dyst tapt í ár, og hevur vunnið báðar dystirnar, sum liðini hava leikt móti hvørjum øðrum í ár.

Støðan í top-6 í elitudeildini er nú tann, at DHG er á odda við 18 stigum. Holte hevur 12 stig, Gentofte 10, HIK Aalborg 8, Frederiksberg 6 og Hvidovre hevur einki stig.

# Landsmót á Egilstøðum

**Í summar verður stór ítróttakapping í Íslandi, har føroyingar eisini hava møguleika at luttaka**

ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Dagarnar 12.-15. juli 2001 verður Landsmót hildið á Egilsøðum í Íslandi. Landsmóti ber heitið, 23. Landsmót Ungmannafelags Íslands UMFI, og fara ungdómar her at kappast í ymsum ítróttagreinum. roknað verður við, at út við 1.700 fólk fara at luttaka á landsmótinum.

Tað, sum kappast verður í, og sum gevur stig til ymsu feløgini eru greinarar: Frælsur ítróttur, kurvabóltur, hondbóltur, flogbóltur, svimjing, íslendsk glíming, talv, borðtennis, badminton, bridge, skjóting, golf, ítróttur fyri brekað og hestaítróttur. Harumframt verða eisini kappingar í sonevndum starvsítróttum so sum traktorkoyring, pannukøkubaking, greining av utrum, plantan av trøum, egning, hestadómar, rættskriving og borðreiðing.

Aðrar greinar, sum verða flokkaðar sum einstaklingagreinar eru súkkling, koyra við bili á ósløttum lendi, roysnistøk, langrenn og marathon. At enda skal sigast, at fýra greinar verða framsýningargreinar, og eru hesar sigling á Lagarfljóti, ítróttur fyri eldri og unglingarenn fyri 12 ár og yngri.

Tá ið gestir og tey, sum taka lut í kappingunum, hava frí frá ítróttinum, kunnu tey stuttleika sær á staðnum við dansi, sigling, ella kunnu tey eisini fara á jazzhátíð, sum verður Valaskjálf felagsheiminum á Egilstøðum. Sjálvsagt eru eisini møguleikar at vitja ymsar framsýningar innan menning og list.

Tilmeldan er opin fyri øllum, og hevur tú hug at far við Norrønu ella flogfarið til Íslands í døgunum 12.-15. juli, kunnu nærri upplýsingar síggjast á alnetinum.

*www.landsmot2001.is*